**Úrskurður Ítróttadómstólsins**

viðvíkjandi kæru frá flogbóltsfelagnum TB

um úrskurðin hjá Dómsnevndini hjá Flogbóltsambandi Føroya

Ítróttadómstólurin hevur viðgjørt kæru frá flogbóltsfelagnum TB, móttikin tann 26. januar 2025 um úrskurðin hjá Dómsnevndini hjá Flogbóltssambandi Føroya, dagfestur 24. januar 2025, í sambandi við, at TB verður dømt at tapa dyst nr. 806 hjá G14 við málmuninum 3-0.

Í viðgerðini í Ítróttadómstólinum hava 5 nevndarlimir luttikið: Anna Rein, formaður, Jóhan Lamhauge, Magnus Dam, Sissal K. Kristiansen og Heðin Joensen nevndarlimir.

Semja er millum limirnir í Ítróttadómstólinum um, at allir limir eru gegnigir til at viðgera kæruna.

Kæran er innkomin rættstundis til Ítróttadómstólin.

Grundarlagið undir viðgerðini av kæruni:

- Kæra frá TB til Ítróttadómstólin send í telduposti 26. januar 2025
- Úrskurður frá kappingarstjóra Flogbóltssambands Føroya viðvíkjandi dysti 806, G 14 B1
- Avgerðin hjá Dómsnevndini í Flogbóltssambandi Føroya, dagfest 24. januar 2025
- Lógir og reglur Flogbóltsambands Føroya
- Lógir og reglur Ítróttasambands Føroya

**Málsgongd / Málslýsing**

G14 B2 hjá TB spælir dyst tann 30. november 2024 (dystur 856). Seinni sama dag spæla G14 B1 hjá TB dyst móti KÍF (Dystur 806). G 14 B1 fekk akkurát mannað lið, og gjørdi TB tí av at læna leikarar frá G14 B 2 í síðstu løtu. Dómaraseðilin varð ikki rætt fyltur út, av tí at tríggir leikarar ikki stóðu á dómaraseðlinum.

Tann 2. desember 2024 kærdi KÍF - Flogbóltur (hereftir KÍF) til Flogbóltssamband Føroya um, at TB hevði nýtt ólógligar leikarar, og leikarar ið ikki stóðu á dómaraseðlinum. Kæran varð send til hoyringar hjá TB. TB viðurkendi, at eitt mistak var framt við dómaraseðlinum, men kærdi samstundis um, at KÍF fyri ein part av dystinum hevði spælt við fimm leikarum. Kappingarstjóri Flogbóltssambands Føroya viðgjørdi málið, og úrskurðurin hjá kappingarstjóra Flogbóltssambands Føroya var, at dystur 806, G14 B1 skuldi leikast av nýggjum.

KÍF kærdi síðani úrskurðin hjá kappingarstjóranum til Dómsnevndina í Flogbóltssambandi Føroya. Dómsnevndin staðfesti, at TB hevði viðurkent at hava brúkt ólógligar leikarar í umrødda dysti eins og staðfest varð, at KÍF spældi við fimm leikarum part av dystinum. Dómsnevndin metti tó ikki, at grundarlag var fyri at taka klagupunktið frá TB viðvíkjandi fimm leikarum við í viðgerðina. Dómsnevndin grundaði hetta á, at TB hevði hvørki mótmælt hetta, tá dysturin varð leiktur og heldur ikki kært um hetta innan kærufreistina.

Tann 24. januar 2025 tók Dómsnevndin hjá Flogbóltssamband Føroya avgerð í málinum. Dómsnevndin staðfesti í síni avgerð, at tað er brot á kappingarreglurnar at spæla við ólógligum leikarum. Úrskurðurin hjá Dómsnevndini var, at TB verður dømt at tapa dystin við málmuninum 3-0, vísandi til grein 19 í kappingarreglunum fyri flogbólt, sum eru soljóðandi: ”*Ger felag brot á greinarnar 4-13, 17 ella 20, kann*

*tað fáa bót og/ella tapa dystin soleiðis, at hitt liðið fær trý stig fyri dystin, og vinnur hann 3-0 í settmuni og 75-0 í bóltmuni.".*

Tann 26. januar 2025 kærdi TB avgerðina hjá Dómsnevndini til Ítróttadómstól ÍSF. Saman við kæruni varð avrit sent av úrskurðinum frá kappingarstjóranum í Flogbóltssambandi Føroya viðvíkjandi dysti nr. 806, G 14 B1 umframt úrskurðinum frá Dómsnevndini dagfestur 24. januar 2025.

Harafturat fylgdi við avrit av kæruni frá KÍF, dagfest 2. desember 2024 saman við avriti av dómaraseðlinum frá dysti nr. 806 umframt myndir av liðunum frá Facebook-bólki hjá TB tann 30. november 2024. Eisini varð avrit av innanhýsis stuttum samskifti hjá TB viðvíkjandi lýsing av dystinum sent Ítróttadómstólinum.

**Ítróttadómstólurin skal viðmerkja:**

*Um heimildir hjá Ítróttadómstólinum at viðgera ítøkiliga kærumálið.*

Í grein 22 í Evstulóg ÍSF, undir yvirskriftini Ítróttadómsmál, eru uppgávur og heimildir hjá dómstólinum ásettar.

Sambært hesum hevur dómstólurin sum útgangsstøði heimild at taka støðu til og viðgera øll tulkingarmál innan ÍSF og sersambond tess, mál um revsing, kappingarmál og kærumál v.m.

Tó er ásett í § 22 stk. 3, at Ítróttadómstólurin kann ikki viðgera mál hjá sersambondum, sum greitt hava tilskilað í viðtøkum sínum, at ovasti myndugleiki liggur hjá stovnum innan viðkomandi samband.

Ítróttadómsstólurin tulkar her orðingina *viðtøkur* í breiðari merking um tað, sum er samtykt sum galdandi lógir og reglur innan sersambondini.

Í Kappingarreglunum fyri Flogbóltssambandið, er í grein 22 um Kærur til dómsnevndina ásett í punkt e, at *Allar avgerðir dómsnevndarinnar eru endaligar*.

Spurningurin er hereftir, um ásetingin í grein 22 e í kappingarreglunum hjá Flogbóltssambandinum er at meta sum ein *greið tilskilan* um, at ovasti myndugleiki liggur hjá stovnum innan viðkomandi samband, sbr. § 22 stk. 3 í Evstulóg ÍSF.

Skipanin í Evstulóg ÍSF er tann, at við limaskapi í ÍSF eru sersambond undirløgd teimum stovnum, ið ÍSF hevur, serstakliga sokallaðu meginstovnunum, sum Ítróttadómstólurin er.

Tó so, sum ásett í § 22 stk. 3, ber til hjá sersambondum í viðtøkum at velja ikki at vera undirgivin Ítróttadómstólinum, men at avgera mál innanhýsis í sersambandinum, sum annars høvdu hoyrt undir Ítróttadómstólin at viðgjørt.

Hetta valið, sum sersambandið kann gera, er orðað sum eitt krav um, at hetta skal vera greitt tilskilað í viðtøkunum. Hvat inniber kravið um, at vera *greitt tilskilað*? Fyri tað fyrsta merkir *tilskilað*, at sersambandið skal aktivt hava tikið støðu til hendan spurning, og í øðrum lagi skal tað vera *greitt*, at hetta er tað, sum samtykt er, t.v.s. at tað eigur ikki at kunna setast spurnartekin við, um sersambandið hevur tikið støðu til og positivt brúkt sína heimild at undantaka sersambandið frá málsræði Ítróttadómstólsins.

Í hesum máli ber til at seta spurnartekin við, hvat liggur í orðingini *Allar avgerðir dómsnevndarinnar eru endaligar*, tí hon eisini kann skiljast á annan hátt, enn at hetta er ætlað at undantaka sersambandið frá

Ítróttadómstólinum. Ásetingin kann skiljast soleiðis, at hon er ætlað til at regulera hvussu mál verða viðgjørd innanhýsis í sersambandinum, t.d. at mál, ið eru kæruviðgjørd, ikki kunnu leggjast fyri aðalfund ella starvsnevnd, og at ásetingin als ikki tekur støðu til viðurskiftini uttan fyri sersambandið, so sum at undantaka sersambandið frá málsræði Ítróttadómstólsins.

Tí er ivasamt, um ásetingin lýkur kravið til *greitt at tilskila*, at ovasti myndugleiki liggur hjá sersambandinum og ikki hjá Ítróttadómstólinum.

Vísandi til omanfyri standandi metir Ítróttadómstólurin seg hava heimild at viðgera ítøkiliga málið.

***Um kærumálið um úrskurðin hjá Dómsnevndini***

Dómsnevndin staðfestir í sínum úrskurði, at tað er brot á kappingarreglurnar fyri flogbólt at spæla við ólógligum leikarum. Dómsnevndin greiðir tó ikki nærri frá niðurstøðu sínari um, at leikt er við ólógligum leikarum. Dómsnevndin staðfestir, at TB hevur viðurkent at hava brúkt ólógligar leikarar í nevnda dysti, men Dómsnevndin greiðir ikki nærri frá, um tað er henda viðurkenning, ella um tað eru onnur viðurskifti í málinum, sum fáa dómsnevndina at leggja til grund, at leikt er við ólógligum leikarum.

Sum Ítróttardómstólurin skilur hetta mál, snýr tað seg um tvey viðurskifti, ið kunnu metast at vera ólóglig: í fyrra lagi at leikarar hava spælt áður í sama leikumfari, og í øðrum lagi, at viðkomandi leikarar ikki stóðu á dómaraseðlinum.

Dómsnevndin sigur í úrskurðinum, at "Úrskurðurin hevur heimild í grein 19 í Kappingarreglunum fyri flogbólt, sum er soljóðandi: "*Ger felag brot á greinarnar 4-13, 17 ella 20, kann tað fáa bót og/ella tapa dystin...*"

Ítróttadómstólurin kann ikki staðfesta, hvørja grein av teimum, sum Dómsnevndin vísir til, brot skal vera framt á.

Í fyriliggjandi máli eru tveir dystir leiktir sama dag – tvs. í sama leikumfari – ein A - og ein B-dystur. Av tí, at Dómsnevndin ikki kemur hesum nærri í sínum úrskurði, ber ikki til hjá Ítróttadómstólinum at staðfesta, um brot er framt á grein 8 í kappingarreglunum.

Kravið um, at allir leikarar skulu standa á dómararseðlinum, er ásett í § 14 í kappingarreglunum. Í § 19 eru ásetingar um sekt, men greinin hevur onga tilvísing til § 14, og tískil metir Ítróttadómstólurin, at tað er ivasamt, um heimild er í § 19 fyri at áleggja sekt fyri brot á § 14.

Ítróttadómstólurin kann sostatt ikki staðfesta, um avgerðin hjá Dómsnevndini er grundað á, at TB-leikarar leiktu í báðum dystum.

Ítróttadómstólurin kann sostatt heldur ikki staðfesta, um avgerðin hjá Dómsnevndini er grundað á, at TB-leikarar ikki stóðu á dómaraseðlinum.

Samanumtikið metir Ítróttadómstólurin, at heimildargrundarlagið undir givnu revsingini í úrskurðinum hjá Dómsnevndini er ógreitt og tí eisini ivasamt, og fer Ítróttadómstólurin at heimvísa málið til nýggja viðgerð í Dómsnevndini.

**Úrskurður**

Grundað á frammanfyri standandi ger Ítróttadómstólurin av at heimvísa úrskurðin hjá Dómsnevnd Flogbóltssambands Føroya til nýggja viðgerð.

Tórshavn 6. mars 2025

Anna Rein Jóhan Lamhauge Magnus Dam

Sissal K. Kristiansen Heðin Joensen

Vegna Ítróttadómstólin

Anna Rein

formaður